# StÍF kann fara avstað

**Vestmenningar hava frí mikukvøldið, so við einum sigri á hoyvíkingum kunnu strandingar leggja seg einsamallar á odda í bestu mansdeildini**

MANSHONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Fult umfar verður í manshondbóltinum mikudagin. Tað vil siga, at seks av teimum sjey liðunum í deildini skulu royna seg, og eru vestmenningar teir einastu, sum kunnu taka sær av løttum.

Júst hetta ger, at møguleiki nú er fyri, at StÍF kann leggja seg einsamalt á odda. Sum er hava vestmenningar og strandingar eins nógv stig, men VÍF hevur tó leikt ein dyst fleiri.

## Spennandi á Hálsi

Og útlitini eru góð hjá strandingum, nú teir aftur vitja í Hoyvíkarhøllini. Har vóru teir eisini um vikuskiftið, tá teir vunnu tepurt á KÍF, men á pappírinum er talan í øllum førum um munandi lættari uppgávu, nú H71 er vertur. Hoyvíkingar hava ikki í sama mun sum áður styrkt sær um liðið við útlendskum kreftum, og tí kunnu teir í løtuni sjáldan gera tær stóru skreytirnar ímóti stóru liðunum.

Ein annar dystur verður í Havn mikukvøldið, tá KÍF fer oman á Nabb at spæla móti Kyndli. Fyrist dysturin hjá "nýggja" KÍF var ímóti júst Kyndli, og einki er at ivast í, at kollfirðingarnir nú ætla sær at betra tepra tapið, sum spurdist burturúr tað ferðina.

Hinvegin er heldur einki at ivast í, at Kyndil hevur tørv á at reisa seg eftir avsmurningin, sum teir fingu í Vestmanna seinasta mikudag, tá teir vóru í Vestmanna. Tað avrikið varð í øllum førum ikki góðtikið av áskoðarum felagsins, og spurningurin er so, hvørt leikararnir hava lært nakað frá tí dystinum.

Seinasti dysturin mikukvøldið verður í Runavík, har Neistin kemur á vitjan. Hóast dysturin millum liðini bæði var sera javnur, tá Tjaldur vitjaði í Havn, so er einki at ivast í, at Neistin er stórfavorittur at vinna dystin. Enn hevur Tjaldur so langt ífrá víst spælið, sum fleiri ferðir í fjør argaði tey stóru, og fyrst og fremst ræður um hjá teimum at fáa venjingarstøðuna og hondbóltslagið annars í nóg góða legu. Tað hevur hon so ikki verið higartil, men hvør veit. Kanska er tað farið at ganga rætta vegin nú.

# Bert sigurin telur

**Bæði Tjaldur og Neistin hava stig fyri neyðini, nú tey hittast í Runavík, har nýggir rumenski hjá Tjaldrinum fyri fyrstu ferð skal royna seg í dysti fyri felagið**

KVINNUHONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Tað vakti ans, tá Tjaldur í sínum seinasta dysti – hann var fyri trimum vikum síðani – vann á útivølli móti Kyndli. Hetta var samstundis eitt tekin til hini feløgini um, at Tjaldur helst er sterkari í ár, enn tær hava verið, og tað tykist eisini sum um, at tær í Runavíkini í ár miðja hægri, enn tær áður hava gjørt.

Ein nýggjur rumenskur málverji er komin til landið síðani dystin móti Kyndli, og hon skal fyri fyrstu ferð royna seg í dysti mikukvøldið, tá Neistin kemur á vitjan. Ein dystur, har Tjaldur uttan iva fer eftir sigrinum, soleiðis at tær kunnu toga seg enn nærri liðunum, sum elta einaráðandi oddaliðið úr Vági.

## Steðgur hjá Neistanum

Tað er hinvegin heldur einki at ivast í, at Neistin eisini fer eftir báðum stigunum, tá tær fara á vøllin. Eitt er, at liðið ikki longur eigur sjálvsagda oddastøðu í føroyskum kvinnuhondbólti, men sum úrslitini hava verið seinastu tíðina, so verður tað nakað langt ífrá, at talan verður um heiðursmerki.

Hetta vilja tær bláu helst broyta nakað mikukvøldið, og tí er ein sigur uttan iva ein treyt fyri teirra viðkomandi. Enn eru tað jú bert tær úr Vági, sum eru farnar avstað, og munurin frá Neistanum upp til næstu liðini er bert eitt stig, so ógjørligt er tað á ongan hátt, men sum sagt, so krevur tað, at úrslitini fara at batna heilt skjótt.

# John Arni í klassa fyri seg sjálvan

**Hóast hann ikki fekk nakran IM-norm burturúr, so hevði John Arni Nilssen fleiri frálík úrslit á júst lidnu talvolympiaduni**

TVEY TALV FRÁ OL
*Carl Eli Nolsøe Samuelsen*

Okkara fyrsta borð í Talvolympiaduni, John Arni Nilssen, hevði eina góða kapping. 5,5 stig av 11 móti sterkari mótstøðu er avgjørt flott, og var hann eisini nær við enn fleiri stig og IM-norm Hann møttu eitt nú tveimum stórmeistarum, og nógvum altjóða meistarum.

Havi valt tvey av hansara talvum, har fyrsta er frá næstseinasta umfarinum (móti altjóða meistara) og tað seinna er frá seinasta umfarinum, har John Arni hitti stórmeistara úr Iran. Framanundan varð greitt at hálvtannað stig til hesi tvey talv gav IM-norm til føroyingin. Tíverri endaðu bæði talvini við javnleiki, men John Arni stríddist manniliga, og var øgiliga tætt við at vinna bæði talvini.

**IM Eid,F (2392) — John Arni Nilssen (2385)**

Olympiad Bled SLO (13), 08.11.2002

1.e4 c5 2.Rif3 Ric6 3.Bb5 g6 4.0-0 Bg7 5.Re1 e5 6.c3 Rige7 7.d4 cxd4 8.cxd4 exd4 9.Bf4 (Hvítur er ikki áhugaður í finnuni, men fer heldur eftir góðum spæli. John Arni er tó kaldur) 9...0-0 10.Bd6 b6 11.e5 Bb7 12.Ribd2 Re8 13.Ric4 Nf5 14.Ba4 Rih4 15.Ricd2 Rixe5 (skopuningurin kompliserar støðuna) 16.Bxe5 Bxe5 (her var Bxf4 møguligt, sum sær betri út) 17.Rxe5 Rxe5 18.Rixe5 Rixg2 19.Fg4 Rih4 20.Bb3 Ff6 21.Re1 Re8 22.Bxf7+ Fxf7 23.Fxh4 Fd5 24.Rie4 Rxe5! (John Arni letur frúgv fyri rók og bisp. Eitt gott val) 25.Rif6+ Kg7 26.Rixd5 Rxe1+ 27.Kg2 Bxd5+ 28.f3 Re5 29.Fxd4 Kf6 30.Fh4+ Kg7 31.Fd4 Kf6 (støðan er jøvn, men hvítur vil meir, og leypur framav) 32.Kg3 Ke6! 33.Fg4+ Rf5 34.f4 Bxa2 35.Fe2+ Kf7 36.Fa6 Ra5 37.Fc8 Be6 38.Fh8 Rh5 39.Fb8 Rh3+ 40.Kg2 Rb3 41.Fe5 a5 42.Fh8 h5 43.Kg1 Rb5 44.Kf2 Bf5 45.Fh7+ Ke6 46.Fg8+ Kd6 47.Fb8+ Ke7 48.Kg3 (hvítur hevur yvirspælt støðuna, og John Arni er tætt við at vinna talvið. Men hvítur finnur nú góða bjargingarplan. Kongurin skal við í leikin) 48...Rb3+ 49.Kh4! Rb5 50.Kg5 d6 51.Kh6 Rxb2 52.Fb7+ Kd8 53.Kg7 Rb4 54.Kf6 Rb1? (seinasti møguleiki var Be4) 55.Fb8+ Kd7 56.Fb7+



(John Arni má taka til takkar við javnleiki) 56...Kd8 57.Fb8+ Kd7 58.Fb7+ Kd8 59.Fb8+ remis

**John Arni Nilssen (2385) — GM Ghaem Maghami (2511)**

Olympiad Bled SLO (14), 10.11.2002

1.d4 Rif6 2.c4 e6 3.Ric3 Bb4 4.g3 c5 5.Rif3 Rie4 6.Fd3 cxd4 7.Rixd4 Fa5 8.Rib3 Rixc3 9.Bd2 Rie4 10.Fxe4 Bxd2+ 11.Rixd2 0-0 12.Bg2 Ric6 13.Fd3 d5 14.cxd5 Rd8 15.0-0 exd5 16.Rib3 (John Arni hevur eina sunna støðu við ongum veikleikum) 16...Fb6 17.e3 Bg4 18.Rid4 Rac8 19.Rfc1 Bh5 20.Rixc6 bxc6 21.Fd4 c5? (viknar um svørtu støðuna og missur finnu) 22.Fe5! Be2 23.Bxd5 Ff6 24.Fxf6 gxf6 25.e4 (heldur ivasamt. Svartur sleppur nú av við dupultfinnuna. Betri hevði verið Bc4) 25...f5! 26.Rc3 fxe4 27.Bxe4 Rd2 28.b3 Re8 29.Bf3 (Bc6 hevði varveitt bisparnar á borðinum, og helst verið betri) 29...Bxf3 30.Rxf3 Re7 31.Rc1 Rxa2 32.Rxc5 Rb7



(man sigur um rókaendatalv, at tey næstan altíð eru jøvn, sjálvt um ein hevur finnu meir. Hetta endatalvið er sera torført at vinna, og John Arni roynir eisini sítt ítarsta) 33.Rg5+ Kf8 34.Rc5 Ra3 35.Rcc3 a5 36.Kg2 Kg7 37.Rc5 Raxb3 38.Rg5+ Kf8 39.Rxb3 Rxb3 40.Rxa5 Kg7 41.Rg5+ Kf6 42.Rg8 Rb2 43.h4 h6 44.g4 Ra2 45.h5 Ra4 46.Kg3 Ra3+ 47.f3 Ra4 48.Rb8 Ra6 49.Rb4 Kg7 50.f4 Ra3+ 51.Kh4 f6 52.Rb7+ Kg8 53.Re7 Rf3 54.f5 Ra3 her tímdi John Arni ikki meir, og tók remis.

# OL-endaliga støðan

Sum vant, so gjørdist Russland aftur hesa ferð ovasta liðið í OL-kappingini í talvi, men russar fingu tó sera harða kapping frá Ungarn, sum eisini vann fleiri dystir enn Russland. Samanlagt var hetta kortini ikki nóg mikið, tí russar fingu fleiri stig í einstøku talvunum.

Besta norðurlendska tjóðin var Ísland, sum gjørdist nummar 22 av teimum 134 tjóðunum. Føroyska liðið endaði sum nummar 92 við 26 av 56 møguligum stigum. Atlso eitt stig undir málinum, sum var at fáa 50% úrtøku, men kortini nakað omanfyri styrkismetingina. Vert er eisini at leggja til merkis, at Føroyar vunnu fleiri talv enn eitt nú Finnland og Noreg, men sum Rani Nolseø segði eftir kappingina, so var tað dýrt fyri okkar aviðkomandi, at vit taptu somikið sannførandi, tá vit spældu móti teimum hampuliga sterku tjóðunum.

Av yvirlitinum niðanfyri framgongur, hvussu endaliga støðan var hjá tíggju teimum fremstu londunum eins og norðanlondunum.

| Nr. | Land | v | j | t | stig |
|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Russland | 10 | 3 | 1 | 38,5 |
| 2 | Ungarn | 11 | 2 | 1 | 37,5 |
| 3 | Armenia | 7 | 4 | 3 | 35,0 |
| 4 | Georgia | 10 | 0 | 4 | 34,0 |
| 5 | Kina | 8 | 3 | 3 | 33,5 |
| 6 | Holland | 9 | 3 | 2 | 33,5 |
| 7 | Ongland | 7 | 4 | 3 | 33,5 |
| 8 | Slovakia | 6 | 5 | 3 | 33,0 |
| 9 | Ísrael | 7 | 3 | 4 | 33,0 |
| 10 | Jugoslavia | 8 | 3 | 3 | 33,0 |
| 22 | Ísland | 8 | 3 | 3 | 32,0 |
| 26 | Danmark | 7 | 3 | 4 | 31,5 |
| 32 | Svøríki | 8 | 3 | 3 | 31,0 |
| 45 | Finnland | 6 | 5 | 3 | 30,5 |
| 48 | Noreg | 6 | 1 | 7 | 30,0 |
| 92 | Føroyar | 7 | 2 | 5 | 26,0 |

## Komandi dystir

**Hondbóltur**
**1. deild kvinnur**
13.11 18.30 Tjaldur-Neistin

**1. deild menn**
13.11 20.00 H71-StÍF
13.11 20.00 Kyndil-KÍF
13.11 20.00 Tjaldur-Neistin




Vaktar- & Bjargingartænastan

## Fráboðan um kanningarvirksemi

Lyst verour at felagio Agip (UK) Limited fer at gera ymiskar kanningar av havbotninum. Hetta verour gjørt í samband vio at felagio fer at bora í hesum økinum komandi summar.

Skipio fer at kanna havbotnin vio ymiskari serútgero.
Kanningarnar umfata lágseismikk, sonar og ekkolod.
Royndir veroa eisini tiknar av havbotninum.

Kanningarnar veroa gjørdar innanfyri hesar knattstøour:

60°33' N og 004°49' W
60°30' N og 004°42' W
60°26' N og 004°46' W
60°28' N og 004°54' W

Byrjao verour .............. 16.11.2002
Arbeioio tekur væntandi... 6 vikur
Skipanavn................. Svitzer Meridian
Kallibókst/Heimstaour.... C6QR4, Nassau, Bahamas
Fiskiveioiumboo........... Ongin

Samband fæst vio skipio á VHF rás 16

Nærri upplysingar fáast vio at venda sær til MRCC Tórshavn 351300.

Útbjóðing

## Farmaavgreiðsla í Skúvoy

Strandfaraskip Landsins fara vio hesum at bjóoa útrakstraruppgávuna av farmaavgreiosluni í Skúvoy.

**Uppgávurnar hjá farmaflutningsdeildini**
Farmaflutningdeildin skal veita leiosluni eina úrslitagóoa fyrisiting innan farmaflutningin, herundir samskipa, viólíkahalda og menna styringina innan farmaflutning.

**Uppgávurnar hjá avgreiosluni**
Uppgávurnar hjá avgreiosluni í Skúvoy, sum er undir farmaflutningsdeildini, eru:
• Farmaavgreiosla
• Skipaavgreiosla
• Skriva farmabrøv
• Tryggja at samsvar er millum farm og farmabrøv
• Farmauppgero

**Førleikakrøv**
Vit rokna vio, at tú sum skal røkja uppgávurnar er:
• Fyrikomandi
• Álítandi og røkin.

**Setanartreytir**
Starvio verour sett sambært avtalu.

**Umsóknir**
Umsókn skal sendast til:

**Strandfaraskip Landsins**
att. Starvsfólkadeildin
Boks 88
FO-110 Tórshavn

og skal vera fyritøkuni í hendi í seinasta lagi 25. november 2002.

Um tú ynskir nærri upplysingar, kanst tú ringja til Heina á Borg, farmaflutningsleioara, á tlf. 343060 ella e-post: hab@ssl.fo.

STRANDFARASKIP LANDSINS

*Høvuðsuppgávan hjá SL er at lúka landsins tørv á innanlands fólka- og farmaflutningi, og skal fyritøkan sostóran mun sum gjørligt røkast á handilsligum støði. Fólka- og farmaflutningurin setir stór krøv um eina góða kundatænastu, herundir trygd, regluseml og skjótleika.*

*Árliga rakstrarætlanin hjá Strandfaraskipum Landsins javnvigar við yvir 160 mió. kr. Talið á starvsfólkum svarar til 180 fulltíðarstørv, harav umleið 155 operatørar. Talið á flutningsanleggum er 11 skip, 40 bussar og 15 lastbilar. Flutningsuppgávurnar fevna um alt landið.*

## Lærari til Vestmanna skúla

Søkt verour eftir lærara til tíoaravmarkao starv vio Vestmanna skúla frá 06.01.2003 og restina av skúlaárinum fyri lærara í barnsburðarfarloyvi.

Í tímatalvuni, io er fulla tío, eru m.a.: tyskt, enskt, kristni, heimkunnleiki, heimstaoarlæra og serundirvísing.

Starvio verour lønt sambært sáttmála millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálastyrio.

Nærri upplysingar um starvio fáast vio at venda sær til skúlastjóran tlf. 424105 ella skúlastýrisformannin tlf. 424566.

Umsóknir vio avriti av prógvum skulu vera skúlastýrinum í hendi í seinasta lagi 22. nov.

**Vestmanna Skúlastýri**
v/ Jógvan í Dávastovu
FO-350 Vestmanna

Skálabúðin
Dr. Jakobsensgøta 21 - Tel 316316

Ekspetrisa søkist til fjølbroytt arbeioi innan handils- og krambúoaryrki skjótast gjørligt.

Vit vænta av tær, at tú ert røsk, fyrikomandi og hevur góo samarbeiosevnir og hevur tú royndir innan klæðna- og meturvørur, hevur tao fyrimun. Løn er sambært S&K.

Umsókn vio upplysingum um royndir og útbúgving skal sendast til

**P/f Skálabúoin**
Box 178
Tórshavn

## Kunningarleiðari

Feroavinnan í Vágum og Vága Vinnufelag hava lagt saman og fara í næstum at lata upp nýggja Kunningarstovu í Vágum.

Vit søkja tí eftir einum dagligum leioara at byrja 1. januar 2003.

**Arbeiosuppgávurnar á Kunningarstovuni eru m.a.:**
√ at kunna um Vágar og Mykines.
√ at marknaoarføra Vágar og Mykines vio faldarum o.ø.
√ at menna og skipa fyri tiltøkum/túrum til feroamannin.
√ at menna og samskipa handils- og tænastuvinnuna í økinum.
√ at kunna um og samskipa tiltøk innan mentan í økinum.

**Kunningarleioarin skal helst:**
√ kunna arbeioa sjálvstøougur og hava góo samstarvsevni
√ hava hollan málkunnleika
√ hava teldukunnleik á brúkarastøoi
√ royndir innan feroavinnu er ein fyrimunur.

Nærri fæst at vita vio at venda sær til Heoin Poulsen, nevndarformann á tlf. 21 81 15.

Skrivlig umsókn skal veroa okkum í hendi innan 1. desember.

**Kunningarstovan**
Postboks 13
370 Miovágur

## Frá Eysturoyar Javnaðarfelag

Bjóoao verour til limafund í Bygdasalinum á Skála hósdagin 14. november kl 20.00

**Evni:** Privatiseringar

Vio á fundinum vera Jóannes Eidesgaard, Katrin Dahl Jacobsen og Andreas Petersen.

**Nevndin**

Sosialurin